## Skrivstovufólk

Á Dómaraskrivstovuni verður søkt eftir fólki við hollari skrivstovuútbúgving til setan tann 1. september 2001.

Talan er um eitt starv við niðursettari arbeiðstíð – 30 tímar um vikuna.

Viðkomandi verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, ella Niels Tang Christensen, rættarassessor, tlf. 311003.

Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 17. august 2001.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
*tann 27. juli 2001*
**Niels Tang Christensen**
**ra.**

Heysthálvan 2001

Stóra
**Teldukoyrikortið**
*byrjar 20. august*

**Undirvíst verður mánadag og mikudag frá kl. 13.00 - 16.45**

*Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Tel: 318813, Fax: 313374
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, http: //sth.olivant.fo

Heysthálvan 2001

**Teldukoyrikort**
*byrjar 21. august*

**Undirvíst verður týsdag og hósdag frá kl. 8.30 - 12.15**

*Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Tel: 318813, Fax: 313374
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, http: //sth.olivant.fo

## Víkingur 900
### Framúr útróðrarbátur

Longd 9,60 m, breidd 3,40 m við stórari last, 12 stk. 350 l kassar. Motorur Cummins 300 hk. Til sølu uttan fiskiloyvi. Báturin er eisini væl egnaður til alivinnu og ferðafólkaflutning. Boð undir kr. 500.000,- ongan áhuga.

Nærri kann fáast at vita við at ringja tlf. 332379.

## Barrfólk og servitrisa

Søkt verður eftir barrfólki og servitrisu at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir avtalu.

RIO BRAVO RESTAURANT
Tlf. 319767 ella 219696

ROTTANGAR

Vit hava alt tilfar til kloak

**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin 311820

## Starlet 29
### útróðrarbátur

Við øllum nautiskum tólum, línuspæli, 5 elektroniskum snellum frá Oilwind. Motorur Perkins 120 hk. Til sølu. Báturin er í sera góðum standi. Boð undir kr. 400.000,- ongan áhuga.

Nærri kann fáast at vita við at ringja tlf. 332379.

**RÆTTING**

lýsingin ið var
í hósdagsblaðnum
var skeiv

**NÁTT_BUSSURIN**
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Vestmanna

Leygarkvøldið :

- Vestm.-Tórsh. kl. 20.50
- Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
- Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
- Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
- Tórsh.-Vestm. kl. 04.30 frá City

(Koyrt verður um Kvívík)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Bussarnir:
Tlf. 286254

Norðurlandahúsið í Føroyum

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

## Rustviðgerð

Rustviðgerð við dimatrol

Vit rustviðgera bil tygara bæði skjótt og væl

ring og fá eitt tilboð

pf AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 223880
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

*Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir*

**Vit útvega eisini:**
*Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir*
*Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur*
*Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni*
*Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari*

*... sjálvandi til besta prísin !!*

FARPACK

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com


# ítróttur

Nr. 147 • fríggjadagur • 3. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## FM í frælsum ítrótti verður leygardagin

Leygardagin fara ítróttarfólk at kappastí FM í frælsum ítrótti.

Kappingin verður hildin á ítróttarøkinum á Svangaskarði, og kappast verður í renning, longdarlopi og kúlustoyti.

Í renningini eru greinarnar hesar: 100 metrar, 400 m, 800 m og 5000 m.

Kappingin er opin, og tað merkir, at øll, sum eru yvir 14 ár, kunnu luttaka í kappingunum leygardagin.

Neyðugt er tó við tilmelding, og hon skuldi gerast í seinasta lagi hóskvøldið kl. 20.00

FM-kappingarnar byrja leygardagin kl. 13.00.

**ek**



*– Vit eru 24 fulltíðar yrskisspælarar, sum stríðast um at sleppa á besta liðið. Tríggjar tær fyrstu vikurnar gjørdu vit lítið annað enn at renna, men nú eru vit farnir at venja við bólti og at spæla venjingardystir, sigur Julian Johnsson*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Julian trívist væl í grótharðari kapping

**Í Hull eru teir seks miðvallarar, sum stríðast um tvey pláss, men føroyski landsliðsmaðurin hevur avgjørt ikki mist mótið**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Annan leygardag verður sjøtul settur á eitt nýtt kappingarár í Onglandi. Nógvir føroyingar fylgja við í eingilskum fótbólti, har føroyingar taka á við Manchester United, Liverpool, Arsenal, Chelsea, Tottenham og fleiri øðrum liðnum. Og so eru tað tveir, sum halda við Everton!

Eingin ivi er um, at tað í komandi kappingarári fer at verða fylgt væl við, hvussu tað fer at hilnast hjá Hull. Frá tíðini undan 2. heimsbardaga og inntil í seksti árunum var býurin væl kendur í Føroyum, tí føroysk skip ofta seldu ísfiskalastir har.

Nú verður býurin áhugaverdur, tí ein føroyskur fótbóltsspælari skal vera við til at lyfta Hull City úr fjórði bestu deildini og upp har, sum bæði tann hálva milliónin, sum býr í Hull, og onnur halda, at tað hevði verið meiri hóskandi, at liðið átti at spælt.

### Stór kapping

Julian Johnsson hevur fingið sína søk fyri, men hann ætlar sær ikki niður við nakkanum:

– Vit eru 24 fulltíðar yrskisspælarar, sum stríðast um at sleppa á besta liðið. Tríggjar tær fyrstu vikurnar gjørdu vit lítið annað enn at renna, men nú eru vit farnir at venja við bólti og at spæla venjingardystir.

Annan leygardag skal Hull í fyrsta umfarinum í landskappingini spæla á útivølli ímóti Exeter.

Roknar tú við at fáa møguleikan á besta liðnum?

– Tað vóni eg sjálvandi, men tað er stór kapping um plássini. Vit spæla 4–4–2, og vit eru seks spælarar, sum stríðast um tey bæði sentralu miðvallar plássini. Millum aðrar kappist eg við Phil Popp, sum er 31 ára gamal og júst er komin frá Leicester, har hann hevur verið í fýra ár, og so við onkrar spælarar, sum eru komnir frá Bradford og Tottenham, har teir ikki hava megnað at gjørt seg galdandi. Men uttan mun til, hvussu tað verður nú beinanvegin, so rokni eg avgjørt við at sleppa at royna meg. Kappingarárið er langt, og vit skulu spæla kanska einar hálvt hundrað dystir.

### Gott skoðsmál

Týskvøldið spældi Hull á heimavøllinum, Boothferry Park, ímóti skotska Kilmarnock. Hull vann 3–1. Eins og í venjingardystinum, sum teir í vikuskiftinum spældu ímóti Sheffield Wednesday, so spældi Hull við einum liði í 1. hálvleiki og einum heilt øðrum liði í 2. hálvleiki. Julian spældi í 2. hálvleiki. Hull vann 3–1, og øll málini vórðu skorað eftir steðgin.

Julian skoraði eitt mál fýra minuttir eftir steðgin, men dómarin kolldømdi tað fyri rangstøðu. Julian heldur, at tann dómurin var ivasamur. Sambært eingilskar fjølmiðlar legði Julian við einari sending í dýpdina upp til 3–1 málið.

Venjari í Hull City er Brian Little. Miðskeiðis í níti árunum var hann venjari í Aston Villa, sum tá kappaðist við tey bestu. Í síni fótbóltstíð spældi Brian Little m. a. við Newcastle.

– Eg havi skift orð við hann, men hann tosar ikki so nógv við spælararnar. Bæði í dystinum ímóti Sheffield Wednesday og ímóti Kilmarnock segði venjarin, at tað gekk best hjá tí liðnum, sum eg var so heppin at vera á. Tað ger tað sjálvsagt uppaftur hugaligari og styrkir um trúnna uppá, at eg fari at sleppa upp í part. Kappingin er ógvuliga hørð, men tað visti eg av, og eg eri til reiðar at stríðast alt tað, sum skal til.

### Líka væl landsliðið

Í fyrradagin fekk Julian Johnsson landsliðsboð. Allan Simonsen og hansara menn skulu til Jugoslavia, og Julian gleðir seg nógv at hitta landsliðsfelagarnar. Henda fyrsta mánaðin hevur hann búð á gistingarhúsi. Familjan hevur verið saman við honum, men nú eru tey farin til Føroya at ferðast. Tey rokna við at hús verða tøk at flyta í um einar tvær vikur.

Hvat siga teir til, at tú akkurát nú tað verður farið undir landskappingina, fert úr felagnum fyri at umboða Føroyar?

– Tað havi eg tosað við teir um, og teir eru sera positivir. Teir siga, at teir kenna tað sum ein heiður, at spælarar úr Hull taka lut í landsdystum.

Í kvøld skulu Julian og teir aftur í eldin. Teir skulu spæla venjingardyst á heimavølli ímóti jugoslaviska FK Obilic úr Beograd, sum m. a. fyrireikar seg til fyrsta innleiðani umfarið í UEFA Cup. Har verður fyrri dysturin spældur mitt í komandi viku.

Áðrenn teir í Hull fóru undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið hildu spælararnir summarfrí. Julian kom beinleiðis úr norsku landskappingini og til Hull.

Ert tú ikki troyttur av fótbólti?

– Eg havi sjálvur valt hetta her, so tað kann er ikki vera. Eg rokni ikki við at fáa frí fyrrenn komandi summar. Tað er útilokað at koma heim at halda jól, tí tað eru nógvir dystir á skránni um ársskiftið. Men eg taki ein dag í senn, og so gleði eg meg at vera saman við landsliðnum, sigur Julian Johnsson.